# VEGLEIÐING UM RÆTTIN TIL INNLIT

Oktober 2020

1. útgáva

Dátueftirlitið

# Innihald

1. Rætturin til innlit (§ 26) ....................2
1.1. Hvat fevnir rætturin til innlit um? ....................2
1.2. Kanst tú biðja skrásetta um at nágreina sína áheitan um innlit? ....................2
1.3. Innlit í upplýsingar um børn ....................3
1.4. Hvørjar upplýsingar skalt tú geva skrásetta? ....................3
1.4.1. Rætturin at vita, hvørjar persónupplýsingar tú viðger ....................3
1.4.2. Fleiri upplýsingar um tær viðgerðir, sum verða framdar ....................6
1.5. Undantøk frá rættinum til innlit ....................7

## 1. Rætturin til innlit (§ 26)

### 1.1. Hvat fevnir rætturin til innlit um?

*Fyri tað fyrsta* merkir rætturin til innlit, at skrásetti hevur rætt til at síggja persónupplýsingarnar, sum tú viðger um viðkomandi. Vanliga vil hetta vera persónupplýsingar, sum tú viðger í málum í tínum KT-skipanum o.s.fr., men talan kann eisini vera um vakmyndatólsyvirvøku, har skrásetti er at síggja.

*Fyri tað næsta* merkir rætturin til innlit, at skrásetti hevur rætt til at fáa nakrar upplýsingar um viðgerðina ella viðgerðirnar, sum tú fremur.

Endamálið við rættinum til innlit er, at geva skrásetta møguleika fyri at síggja, hvørjar persónupplýsingar tú viðger um viðkomandi og tryggja gjøgnumskygni um, hvussu tú viðger persónupplýsingarnar.

Við støði í hesum kann skrásetti kanna, um persónupplýsingarnar eru rættar og eisini, um tær verða viðgjørdar lógliga.

### 1.2. Kanst tú biðja skrásetta um at nágreina sína áheitan um innlit?

Um tú sum dátuábyrgdari hevur skrásett eina stóra mongd av persónupplýsingum um tann skrásetta, ið ynskir at fáa innlit, kanst tú biðja viðkomandi um at nágreina sína áheitan. Hetta er eisini galdandi, um áheitanin um innlit er ógreið. Tað kann vera, at skrásetti ynskir at fáa innlit í nakrar ávísar upplýsingar og um skrásetti nágreinar sína áheitan, styttir hetta um málsviðgerðina.  Um skrásetti ikki nágreinar umbønina, kanst tú ikki av teirri orsøk nokta at svara.

Tað eru eingi formkrøv til innlitsumbønina frá skrásetta, sum sostatt kann setast fram bæði munnliga og skrivliga. Hetta hevur m.a. við sær, at tú sum dátuábyrgdari ikki kann krevja, at skrásetti setur umbønina fram skrivliga.
Í summum støðum er tað hóskandi, at tú heitir á skrásetta, ið ynskir at fáa innlit, um at hjálpa tær við at finna tær upplýsingar, sum tú hevur um viðkomandi. Hetta kann t.d. vera,

um ein persónur biður um innlit í vakmyndatólsupptøkur í einum handli. Her eru upplýsingar um t.d. tíð, stað og møguliga ein mynd av skrásetta, viðkomandi upplýsingar, ið kunnu hjálpa tær sum dátuábyrgdara at eyðmerkja persónin á upptøkuni. Um skrásetti ikki ynskir at hjálpa, skalt tú tó framvegis svara áheitanini í tann mun tað er gjørligt (sí vegleiðing um formlig krøv í samband við rættindi hjá skrásetta 2.5 og 2.6).

## 1.3. Innlit í upplýsingar um børn

Tá persónupplýsingar um børn verða viðgjørdar (t.d. á einum bíðilista til barnagarð) kann tann, sum hevur foreldramyndugleikan biðja um innlit vegna barnið.

Er barnið eldri, kann barnið sjálvt biðja um innlit. Tað ber ikki til at áseta eitt greitt aldursmark á, nær eitt barn kann fáa innlit. Tað velst um, hvussu búgvið barnið er og krevur eina ítøkiliga meting. Vanliga eru børn tó at meta sum búgvin, tá tey eru 15 ár.

At barnið fær innlit í upplýsingarnar útilokar ikki, at tann sum hevur foreldramyndugleikan eisini kann fáa innlit. Tað eru tó ávísar upplýsingar um børn undir 18 ár, sum foreldur ikki uttan víðari eiga at fáa atgongd til. Tað er t.d. um upplýsingar, sum eru ógvuliga persónligar og viðkvæmar. Hetta kann t.d. vera upplýsingar í læknajournal.

## 1.4. Hvørjar upplýsingar skalt tú geva skrásetta?

### 1.4.1. Rætturin at vita, hvørjar persónupplýsingar tú viðger

Um tú viðger persónupplýsingar um tann persónin, sum krevur innlit, skalt tú upplýsa skrásetta um hetta og geva viðkomandi atgongd til tær persónupplýsingar, sum tú viðger um viðkomandi.

At skrásetti skal hava atgongd til upplýsingarnar merkir, at tú kanst velja at geva skrásetta atgongd til (avrit av) frumrit, mál, vakmyndaupptøkur ella líknandi. Tú kanst eisini avrita upplýsingarnar í eitt nýtt skjal. Avgerandi er, at skrásetti fær atgongd til upplýsingarnar, so at skrásetti kann tryggja sær, at upplýsingarnar um hann ella hana eru beinar, og at viðgerðin er lóglig.

Skrásetti hevur eftir § 26 bara atgongd til upplýsingar um seg sjálvan. Upplýsingar um onnur skulu tí strikast el.líkn. í tí tilfari, sum skrásetti fær atgongd til.

Um tú ert ein almennur myndugleiki, skalt tú samstundis geva tær far um samanspælið millum reglurnar um innlit í dátuverndarlógini, í lógini um innlit í fyrisitingina[1] og í fyrisitingarlógini[2]. Sum útgangsstøði skalt tú veita innlit í tilfarið sambært teimum reglum, sum geva skrásetta flestu upplýsingarnar.[3] Í hesum sambandi hevur tað minni at siga, hvat fyri lóg skrásetti møguliga hevur víst til, tá viðkomandi bað um innlit í tilfarið ella bað um innlit í málið.

Tú skalt geva skrásetta eitt ókeypis avrit av persónupplýsingunum. Um skrásetti biður um fleiri avrit, kanst tú krevja eitt hóskandi gjald fyri fyrisitingarliga kostnaðin.

---

[1] Løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001
[2] Løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg
[3] Sí løgbita 13 um fyrisitingarlógina, innlitslógina og persónsupplýsingarlógina á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni, lms.fo

**Dømi 7 – Starvsfólk krevur innlit í upplýsingar hjá arbeiðsgevara**

Eitt starvsfólk, Óli, biðjur um innlit í tær persónupplýsingar, sum arbeiðsgevarin, ein fyritøka (F), viðger um Óla

F gevur Óla eitt yvirlit yvir hvørji sløg av persónupplýsingum, sum fyritøkan viðger um Óla.

Á yvirlitinum stendur t.d.: "navn", "bústaður", "yrkisfelagsligt tilknýti" og "heilsuupplýsingar", men veruligu persónupplýsingarnar síggjast ikki. Tó boðar F frá, samstundis sum yvirlitið verður útflýggjað til Óla, at Óli kann fáa fatur á persónupplýsingunum við at venda sær til setanarskrivstovuna (HR) og fáa útflýggjað sína starvsfólkamappu.

*Í hesum førinum fær Óli ikki atgongd til tær persónupplýsingar, sum verða viðgjørdar um seg. Óli hevur ikki møguleika fyri at kanna um persónupplýsingarnar eru rættar, bert út frá einum yvirliti.*

*Tað er ikki nóg gott, at F í staðin fyri kunnar Óla um, hvar hann sjálvur kann finna upplýsingarnar, tí rætturin til innlit innber ein rætt at verða gjørdur kunnugur við tær persónupplýsingar, sum verða viðgjørdar, undir hesum t.d. við útflýggjan av avritum ella líknandi.*

### 1.4.2. Fleiri upplýsingar um tær viðgerðir, sum verða framdar

Afturat kunning um persónupplýsingarnar, ið tú viðger, skalt tú eisini geva skrásetta eina røð av øðrum upplýsingum, tá tú svarar áheitanini um innlit. Hendan eykakunning kann t.d. gevast í einum fylgibræv ella líknandi.

Tú skalt fyri tað fyrsta kunna skrásetta um *endamálini* við viðgerðini.

Harumframt skalt tú kunna um tey ymisku sløgini av persónupplýsingum. Hetta merkir, at tú skal kunna skrásetta um, um tær persónupplýsingar tú hevur savnað eru vanligar persónupplýsingar ella viðkvæmar persónupplýsingar.

Tú skalt eisini kunna skrásetta um teir móttakarar ella sløg av móttakarum, sum tú hevur givið ella fert at geva persónupplýsingarnar til. Hetta er serliga umráðandi, um móttakarar eru í útlondum ella triðjalondum. Kunningin til skrásetta skal so vítt gjørligt nevna einkultar móttakarar, og tað er tí ikki nóg mikið at kunna um, at persónupplýsingarnar verða víðarigivnar til t.d. ”almennar myndugleikar”, um tað er gjørligt hjá tær at nágreina hetta nærri.

Um gjørligt skalt tú eisini kunna um tíðarskeiðið, tú goymir persónupplýsingarnar, ella, um hetta ikki er gjørligt, tær fortreytir, sum verða nýttar at áseta hetta tíðarskeiðið.

Umframt hetta skalt tú kunna skrásetta um, at viðkomandi hevur rætt til at biðja um rætting, striking ella avmarking av viðgerð, og at skrásetti hevur rætt til at mótmæla viðgerðini í serligum førum, og at skrásetti hevur rætt til at kæra til Dátueftirlitið um viðgerðina.

Tú skalt eisini kunna skrásetta um, hvar persónupplýsingarnar stava. Hetta er tó bert viðkomandi, um persónupplýsingarnar eru savnaðar frá øðrum enn skrásetta.

Um automatiskar avgerðir verða tiknar í viðgerðini skalt tú kunna um hetta. Eisini skalt tú geva skrásetta viðkomandi kunning um logikkin í slíkum sløgum av viðgerðum (t.e. hvussu

automatikkurin fer fram), umframt týdningin og tær væntaðu avleiðingarnar av eini slíkari viðgerð fyri skrásetta.

Um tú flytir persónupplýsingar til triðjalond ella millumtjóðafelagsskapir, sbrt. §§ 61-64 í dátuverndarlógini, skal tú vísa á grundarlagið fyri flutninginum.

## 1.5. Undantøk frá rættinum til innlit

*Privat og almenn áhugamál*

Sambært § 36 í dátuverndarlógini nýtist tú ikki at kunna skrásetta, um áhugin hjá skrásetta at fáa kunning má víkja fyri altavgerandi almennum ella privatum áhugamálum.

Almennu áhugamálini eru m.a. atliti til landsins trygd ella verju, við atliti til fyribyrging og eftirkanning av revsiverdum viðurskiftum og við atliti til skrásetta sjálvan.

Privatu áhugamálini eru bæði tíni egnu áhugamál og áhugamálini hjá triðjapersóni. Hetta kann t.d. vera, um tað ikki er ráðiligt, at skrásetti fær kunnleika um, umhugsandi heilsuna hjá skrásetta ella tøtt persónsambond við skrásetta.

Tú kanst bert nýta undantøkini í § 36 eftir eina ítøkiliga meting, og um tað er nærliggjandi vandi fyri, at privat ella almenn áhugamál líða munandi skaða.

*Almenn fyrisiting*

Upplýsingar, sum verða viðgjørdar av almennu fyrisitingini sum liður í umsitingarligari málsviðgerð, kunnu verða undantiknar rættinum til innlit í sama mun sum ásett í §§ 2, 7-11 og 14 í løgtingslóg um innlit í fyrisitingina[4].

*Vísindalig og hagfrøðilig endamál*

Ásetingin í § 26 um innlit er ikki galdandi, um upplýsingarnar einans verða viðgjørdar til søgulig, hagfrøðilig ella vísindalig endamál, og um persónupplýsingarnar bert verða goymdar

[4] Løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001

sum persónupplýsingar so leingi, sum neyðugt er, við atliti at endamálinum við viðgerðini, og um hesar ásetingar gera tað ómøguligt ella í sera stóran mun forða fyri, at endamálið við viðgerðini verður rokkið.

**Vegleiðing**
© 2020 Dátueftirlitið

Endurprent við kelduávísing er lóglig.

Givið út:
Dátueftirlitið
Reyngøta 33
100 Tórshavn
Tlf: 309100
dat@dat.fo
dat.fo

Dátueftirlitið